Dagfest 15-10-2024

# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MATR. 169A Á HAVNARØKINUM, Á TOFTANES Í LEIRVÍK

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Eysturkommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu kortskjølum dagf. 15-10-2024, matr. nr. 169a, Leirvík og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ognum.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bygging á økinum.

Stk. 2. Økini liggja í einum C2 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kunnu brúkast til vinnu- og miðstaðarendamál við serstakari byggisamtykt.

Stk. 3. Økini eru leiguøki, ætlað til samanbygd hús, t.v.s. at Kommunan leigar økini út til áhugaði at byggja á og gera leigusáttmála við viðkomandi, um økið.

Stk. 4. Pláss skal vera fyri bilastøðlum sambært kortskjali 2.

Stk. 5. Tað er gjørd ein felags kloakkskipan við septiktanga fyri økið, sum kloakkin frá bygningunum verður íbundin.
Fyri at binda í kloakkskipanina verður kravt eitt íbindingargjald frá hvørjum bygningi, sum Eysturkommuna ásetur.
Kommunan leggur spill- og regnvatnsrør inntil bygningarnar.

Stk. 6. Vegatkoma til økið, er frá vegnum Sjóvartún í Leirvík.

Stk. 7. Á kortskjalinum er innteknað stødd og staðseting av bygningum. Hesi kunnu verða reguleraði, í sambandi við prosjektering og matrikulering.

Stk. 8. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regularaði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktin fyri Eysturkommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið verður kannað vinnu, handlum, bústovnum, bústøðum og skrivstovum í umhvørvisflokki 2 og 3.

Stk. 2. Byggingin er í tveimum, øki A uml. 312 m$^2$ til støddar og øki B uml. 530 m$^2$ til støddar.

## §4. BYGGING, STØDD, STAÐSETING

4.1. Økið á Toftanesi er eitt planerað øki (grótuppfylling út á sjógv) sum Kommunan hevur gjørt og eigur.
Kommunan hevur samtykt at gera eina ætlan, sí kortskjal 1 og 2, hvussu byggingin skal verða skipa á økinum og at leiga øki út eftir hesi ætlan, til áhugaði at byggja á.
Í byggiætlanini fyri økið á havnarlagnum á Toftanesi, er gjørt p-pláss til bil inni á leiguøkinum.

4.2. **Mest loyvdu hæddir**

1. Bygningar kunnu í mesta lagi byggjast í 2 hæddum.
   Hæddin, máld frá gólvhædd á veghædd og til mønuna, má ikki vera hægri enn 6,40 m.

2. Kota á gólvinum á veghædd, verður ásett av byggimyndugleikanum.

4.3 **Hall á tekju**

1. Hall á tekju er 25 stig.

4.4 **Bygging á leiguøkinum:**

1. Byggjast skal sambært Bygningskunngerðini 2017 og tekningum frá Eysturkommunu:
   Kortskjal 1 Yvirlitskort
   Kortskjal 2 Støðumynd

4.5 **Byggistigið**

1. Bygt verður sambært kortskjali 1 og 2.
   - Byggistigið fyri øki A er 0,54
   - Byggistigið fyri øki B er 0,6

4.6 **Samanbygging av felagsveggi, -tekju og -skotrennu millum matriklar.**

1 Grannar skulu sjálvir avtala og loysa samanbygging av betongveggi, tekju og skotrennu. Tekning sum vísir hvussu hetta verður loyst, verður send til byggimyndugleikan, í sambandi við umsókn um byggiloyvi.

2 Allar tekir skulu hava gráan Protan dúk sum tak.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan. Hetta skal eisini tinglesast í skeytið fyri allar ognirnar.

5.1. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINGARMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Eyturkommunu býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.